## Viðmerkingar:

# Forvirringurin verður totalur

*Sigur Petur á Lava Olsen frá Brunaumsjón Landsins í sambandi við, at leiðarin á brandstøðini í Tórshavn nú hevur stovnað eitt nýtt felag fyri sløkkiliðsleiðarum í Føroyum*



*Savnsmynd*

Viðvíkjandi viðmerkingum og greinum, sum hava staðið í bløðunum Brandværn og Dimmalætting um m.a. nýstovnað felag fyri sløkkiliðsleiðarar, loyvi eg mær at gera hesar einastu og endaligu viðmerkingar.

Soleiðis, sum eg síggi gongdina út frá eini grein herfyri í Dimmalætting um eitt nýstovnað felag fyri sløkkiliðsmanningum í Føroyum, so er støðan tann, at leiðarin á brandstøðini í Tórshavn nú hevur stovnað eitt nýtt felag fyri sløkkiliðsleiðarum í Føroyum. Felagið er ein partur av Foreningen af Kommunale Beredskabschefer í Danmark. Endamálið við stovningini er, at hetta felagið skal bøta uppá tað vánaliga lagið, sum valdar millum kommunalu sløkkiliðini í Føroyum. Eg síggi eisini í eini grein í einum blaði í Danmark, sum eitur Brandværn, ið kemur út eina ferð um mánaðin í 8500 eintøkum, at Føroyar verða ikki júst róstar fyri síni avrik í tíðarrokningini »áðrenn ein ávísur maður kom higar«. Greinin sigur millum annað, at sløkkiliðið í Tórshavn er sum »**pigerne i Nyhav**« og gera, hvat tað skal vera fyri at tjena pengar. Hetta nýggja felagið vil við hjálp frá meginfelagnum eisini virka fyri at gera seg galdandi, eitt nú við at ávirka lógarreglur fyri byggingum í Føroyum, sum sambært greinini skulu vera so mangulfullar.

Eg havi annars roynt at fáa orðið á stigtakaran til nýggja felagið at spyrja nærri um hetta, men hann er vist nokk staddur í Danmark, har hann á kredsformansfundi í móðirfelagnum umboðandi Føroyar.

Mín viðmerking, sæð frá mínum sjónarhorni er, at forvirringurin verður totalur, tá íð tílíkar løgnar konstruktiónir verða gjørdar. Støðan er einfalt, at ein maður fær arbeiði á brandstøðini í Tórshavn, sum síðani ferðast oyggjarnar runt og kemur helst fram til, at her er einki líkinda skil á og tekur síðani stig til, at tað gjøgnum felagið fyri Kommunalar Beredskabschefar í Danmark, skal setast skil á her heima.

Hetta minnir um son Dávid kong, Absalom í bíbliusøguni, sum í síni trongd at sleppa at upp í part at ráða, setti seg so uttarlaga í borgshøllini, at fólk, ið komu at vitja myndugleikarnar, noyddust at hitta hann fyrst. Á henda hátt bleiv hann landsins ráðgevi, og Absalom fekk stilla sína trongd. Ein sera talandi mynd!!

Persónliga meti eg avgjørt hetta verða nakað rót, tí hetta merkir, at vit nú hava tvey feløg fyri sløkkiliðsmanningar. Annað teirra er eitt danskt filial, hitt er reint føroyskt. Tað føroyska felagið, íð telur fleiri hundrað limir er myndugleikaviðurkent og luttekur á ymsan hátt í tí almenna tilbúgvingarliga arbeiðinum her heima. Hvat nú við hesum alternativa felagnum, ið telur einar 13 limir, og sum kanska er íkomið av at stigtakarin hevur betri stundir at vera brunaligur ráðgevi kring oyggjarnar enn onnur?

Skal hetta alternativa felagið nú eisini uppí part ?

Tað Føroyska felagið er væl umboðað í síni nevnd av fólki kring um í landinum. Eg kann nevna, at Landsfelag Sløkkiliðsmanna (tað føroyska felagið) virkar aktivt fyri allar oyggjarnar, millum annað hetta, at landið setir skipaða útbúgving á stovn til tess at menna bæði støði og samstarv. Høvuðsumboðanin í kreds 15, sum er tað føroyska liðið í tí danska felagnum, virkar av royndum fyri, at Tórshavnar Sløkkilið skal útbúgva, menna, og ráðgeva okkara sløkkiliðum og kommunum, eins og gjørt var herfyri í einum tiltaki í samstarvi við Beredskabsstyrelsen í Danmark.

Spola vit nú eitt sindur aftur, so eru tað skjótt 25 ár síðani, at øll fakfeløg og faklig áhugafeløg (t. d. verkfrøðingafelagið og tílík) valdi at blíva føroysk burturav. Man tók ábyrgd av sær sjálvum og sínum egnu viðurskiftum og hevur hetta síðani, eftir vanligum byrjanartrekleikaum, virkað sera væl.

Hondina á hjartað, - Hetta nýggja lagið er ikki vegurin fram. Hetta er klandur, spjaðing og tann reini forvirringur.

Eg meini heilt avgjørt, at hetta við kommunalari tilbúgvingin, menning av sløkkiliðunum, samstarvi og útbúgvingum o.t. er ein uppgáva, sum má og skal lyftast av okkum sjálvum heima - hjá okkum sjálvum. Tað eru vit, sum her búgva, ið skulu mynda samfelagið. Tað er ikki gott, um tað er so, at fólk kanska við turistinnliti og við hópin av hugskotum um, hvussu vit skulu innrætta okkum, taka og kontra tær ofta veiku royndirnar, sum vit sjálvi royna at fáa upp at standa.

Eg vil mæla til, at sløkkiliðsmanningar stuðla tí føroyska felagnum, gera sína ávirkan galdandi í felagnum og syrgja fyri, at júst hetta felagið ger eitt so gott arbeiði í okkara samfelag sum tilber. Tað eru ríkir møguleikar at virka fyri menning, við útgangsstøði í okkara egna felag.

**Petur Olsen**
**Mikkjalstrøð 8**
**Tórshavn**


Vit søkja eftir einum

**MARKNAÐARFÓLKI**

at byrja beinanvegin

Ert tú civil/marknaðarøkonomur ella hevur útbúgving/royndir á sama stigi og heldur tú, at hugtøk sum "KT", "e-business", "Extranet", "World Wide Web", "Portal", "The New Economy", "Nasdaq" og "Internet" ljóða spennandi, so er starvið sum marknaðarfólk hjá okkum kanska nakað fyri teg.

Sum marknaðarfólk hjá okkum fært tú m.a. ábyrgd av at selja og marknaðarføra:

- *Internetportalin in.fo*
- *Dynamiskar webloysnir*
- *e-business loysnir*
- *Standardskipanir*

Bæði í Føroyum og uttanlands.

Hevur tú hug at royna teg sum marknaðarfólk í einari dynamiskari og spennandi fyritøku í vøkrum umhvørvi undir Bryggjubakka, so er bert at senda okkum eina umsókn við upplýsingum um útbúgving, royndir o.a.

Løn og arbeiðstíðir verða at avtala nærri.

Um tú hevur hug at vita meira um starvið sum marknaðarfólk hjá okkum, ert tú vælkomin at ringja 319914 og spyrja eftir Óla Olsen.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. september 2000

P/F VIT - undir Bryggjubakka 17 - FO-100 Tórshavn
tel. 31 99 14 - e-mail: vit@vit.fo - url:www.vit.fo

P/F VIT er ein KT-fyritøka, sum arbeiðir við menning av dynamiskum webloysnum, ráðgeving innan e-business & umsiting av teldunetum. Umframt hetta eigur og rekur P/F VIT internetportalin in.fo. 10 starvast í løtuni hjá P/F VIT. Farodane eigur 80% av P/F VIT og starvsfólkini eiga hini 20%.


## Club 20 hevði 1 mió í undirskoti

Í prátinum við nýggju eigararnar av Café Nátúr fyrr í vikuni, Petur Olsen og Toni Dam skrivaðu vit, at Café Nátúr hevði eina millión krónur í halli, tá teir tóku yvir felagið.

Hetta er komið í bland, tí tað var Club 20 , sum hevði eina millión í halli, tá teir keyptu tað felagið á aðalfundi í limafelagum, Club 20, í mars í fjør.

Vit fara at biðja nýggju og gomlu eigararnar á Cafá Nátúr umbera okkum mistakið.

**Blaðm.**

## Felag fyri motoráhugað verður nú stovnað

Endamálið við felagnum er at samla motorsúkklu-koyrarar og motoráhugaði í einum felag fyri at røkja felags áhugamál, at arbeiða fyri skilakoyring og at skipa fyri felagstúrum og ítróttarkappingum.

Ein áhugabólkur hevur í eina tíð kannað umstøðurnar og undirtøkunafyri at gera eitt meira skipað umhvørvi fyri flest øll, sum hava motorakfør ella hava áhuga fyri hesum. Ein ætlan er at arbeiða fram ímóti at gera eitt sum á donskum verður nevnt »køreteknisk anlæg«. Tað vil siga, at har er ein koyribani, sum kann brúkast til nógv ymisk endamál, millum annað til frálæru hjá koyrilærarum. Har kann eisini skipast fyri fleiri sløgum av motorsporti so sum go-kart-, knallert- og motorsúkklukoyring. Hetta verður nógv brúkt í okkara grannalondum, og tað hevur víst seg at hava sera positiva ávirkan, serstakliga á ungdómin, tí hann fær roynt síni evnir á einum slíkum bana. Hetta hevur víst seg at minka nógv um ta skilaleysu koyringina úti á alfara vegi.

Samband hevur verið við Road Racing Herning, sum í mong ár hevur skipað fyri koyring við m. a go-kart og motorsúkklukoyring, teir eru sera glaðir fyri ta ávirkan, hetta hevur havt á ungdómin har. Har verður gjørt nógv burturúr trygdini, og tað ringasta óhappið, teir hava havt, er eitt broti øsbein. Hetta má sigast at vera gott, tá havt verður í huga, at har verður koyrt næstan hvørt vikiskiftið.

Staðið, har banin liggur, skal eisini hava aðrar hentleikar til koyrifrálæru m.a. hálkubreyt . Hetta er krav í flestu londum rundan um okkum. Vit hoyra hvønn vetur um bilar, bussar og trailarar, sum fara útav vegnum vegna hálku, og við frálæru í hálkukoyring kundu vit kanska sloppið undan fleiri av hesum óhappum.

Áhugabólkurin hevur eisini verið í samband við fleiri stovnar og einstaklingar um hetta, og hevur tað verið sera positivt móttikið allastaðni.

Meira um alt hetta verður at hoyra á fundinum, sum verður á Føroya Maskinmeistaraskúla sunnudagin 3 september kl 16.



# Elsebeth skal loysa málspurningin

*Føroyski landsstýrismaðurin í mentamálum heldur danska mentamálaráðharran hava ábyrgdina av at tryggja føroyska málinum virðiliga rættarstøðu*

JOHN JOHANNESSEN

Eftir fatan landsstýrisins staðfestir evropeiski sáttmálin frá 1992 um økismál og minnilutamál, at føroyskt er minnilutamál, nú danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, hevur undirritað hann.

Hetta hevur danski uttanríkisráðharrin gjørt hóast mótmæli frá landsstýrinum.

Tí vil føroyski landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, nú hava at vita, hvat danski mentamálaráðharrin, Elsebeth Gerner Nielsen, heldur um hesa handfaring.

### Skal hjálpa føroyingum

Tórbjørn Jacobsen vísir Elsebeth Gerner Nielsen á, at danskir myndugleikar eru hægstu myndugleikar á lógarøkinum – eisini fyri Føroyar. Hann sigur, at myndugleikarnir eru danska stjórnin, har hon hevur ábyrgdina fyri mentamálum.

Tí heldur føroyski landsstýrismaðurin í mentamálum, at danski mentamálaráðharrin hevur skyldu at tryggja føroyska málinum eina virðiliga rættarstøðu og fáa tað javnsett við onnur mál.

### Ellivu spurningar

Tórbjørn Jacobsen vil hava danska mentamálaráðharran at svara sær ellivu spurningum.

Millum annað spyr Tórbjørn Jacobsen, um Elsebeth Gerner Nielsen heldur, at danska stjórnin hevur moralskan rætt til einvíst at áseta rættarstøðunma hjá føroyskum máli beint ímóti viljanum hjá føroyingum.

Eisini spyr landsstýrismaðurin, hvat mentamálaráðharrin ætlar at gera fyri at fáa uttanríkisráðharran at gera fyri at broyta avgerð sína, um hon heldur hann hava borið seg skeivt at og æi hvønn mun hon sær tað sum sína uppgávu at tryggja føroyskum máli eina rættarstøðu, sum er í samsvari við tann mentanarliga veruleikan.



*Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum, vil nú hava danska mentamálaráðharran, Elsebeth Gerner Nielsen, at loysa málspurningin*

# Malin gevur fløgu út í Svøríki

*Lovsongsfløgan, sum Malin Zachariassen gav út í oktober í fjør, verður nú útgivin á móðurmáli hennara svenskum*

STEFAN Í SKORINI

14. september fáa sviar møguleika at ogna sær fløguna hjá Malin Zachariassen, sum fyri einum ári síðani varð givin út í Føroyum.

„Drekka av vatninum" var heitið á fløguni, og hon hevur selt hampuliga væl. 700 av teimum 1000 eintøkunum eru tikin av hillunum higartil.

Talan er um somu fløgu, ið nú eisini verður givin út í Svøríki. Tónleikurin frá fyrru útgávuni er goymdur, og hann er nú nýttur umaftur. Bara sangurin er sungin umaftur. Til tað hevur plátufelagið fingið nakrar norskar sangarar til vega. Malin hevur verið í einum upptøkuhøli í Noregi og sungið saman við teimum. Hetta eru fulltíðar tónleikarar, sum bara fáast við at syngja. Norsku sangararnir syngja tó bara bakgrundsrøddirnar, meðan Malin framvegis er høvuðssangarin á fløguni. Upptøkurnar vórðu gjørdar fyri trimum mánaðum síðani.



### Alt var klárt

Malin hevði ikki stórt stríð við at umseta orðini til hesa nýggju útgávuna, tí alt lá klárt frammanundan.

- Eg hevði í veruleikanum umsett allar sangirnar til svenskt, áðrenn teir vóru sungnir inn á føroyskum, tí eg hugsaði tá, at kanska var eisini møguleiki fyri eini svenskari útgávu einaferð seinni, sigur Malin Zachariassen.

Malin skuldi bara fínpussa sangirnar og málberingina, og til tað fekk hon góða hjálp frá foreldrunum. Alt tilfarið lá tískil meira ella minni klárt áðrenn. Malin hevur sjálv skrivað tekstirnar til allar sangirnar á fløguni.

Tað er Marcus Musik, sum stendur fyri útgávuni, og teir taka sær av útbýting og marknaðarføring av fløguni í Svøríki. 3000 eintøk verða prentað í fyrsta upplagi.

Avtalan millum Malin og Marcus Musik kom í lag, við at ein vinmaður hennara hoyrdi fløguna í Svøríki. Hann arbeiðir hjá Marcus Musik, og Malin varð síðani ringd upp av teimum. Hon hevur tískil ikki sjálv gjørt serliga nógv burturúr sær í Svøríki. Aðrir útgevarar lógu eisini framvið, men Marcus Musik gjørdi mest burturúr, og tí skrivaðu tey undir við tað felagið.

Tað er stórur marknaður fyri andaligum lovsongstónleiki í Svøríki, og tí hava tey góðar vónir. Nøkur eintøk koma óivað eisini hendavegin, so føroyingar eisini kunnu ogna sær fløguna á svenskum.


**Back-up!?**

**At brúka eina VXA-bandstøð krevst, at tú hevur eitt SCSI-móti, eitt backupforrit og nøkur (nógv) dáta, sum tú heldur, eru verd at goyma trygt (til dømis eina nýggja uppseting av Bíbliuni). Meira næstu ferð.**

**Sp/f GEYMAR**
Tel. 22 17 87 • geymar@post.olivant.fo
Hygg eisini á www.ecrix.com
*Hans Eliesar, Herbein og Snorri Fjallsbak eiga Geymar*
Sosialurin - 311820